Formansfrágreiðing 2025

Í 2017 varð skipað fyri navnakapping. Meginfelagið á brekøkinum skuldi hava nýtt navn. Inn komu 157 uppskot, og á eykaaðalfundi 2018 varð endaliga og einmælt samtykt, at meginfelagið skuldi eita MEGD, og nýtt búmerki varð gjørt.

MEGD var tá eitt nýtt føroyskt navn og í hesum føri eitt sernavn. Grundgivið varð víðari, at orðið hevur positiva merking í megi og styrki og setir fokus á møguleikarnar hjá einstaklinginum og felagnum fram um forðingarnar.

Um búmerkið er at siga, at MEGD er skrivað eitt sindur øðrvísi - á ein viðarbul. Tankin er, at lívið ikki er beint fram. Vit møta avbjóðingum í lívinum, sum gera, at vit fara umvegir, niður á næstu reglu - tað ger onki - viðhvørt høvdu vit ikki vilja verið tað fyri uttan.

Viðarbulurin er meginlutur av trænum, har greinar vaksa út, og er júst ímyndin av MEGD. Viðarbulurin leggur lunnar undir, at greinar og bløð nørast. Grøni liturin er millum annað tekin um ró, nøring, vøkstur, orku og tryggleika.

Skapið á viðarbulinum er ikki ein fullkomin rundingur, og fólk undrast á, hví skapið er so. Síðani verður spurt og høvi gevst at greiða frá og fáa góðar samtalur. Uttara skapið á viðarbulinum ímyndar eisini vernd, góðsku og felagsskap.

Saman standa vit sterk

Hví byrja aðalfundin 2025 við hesum orðum frá 2018? Tí í dag sum ongantíð fyrr er neyðugt hjá okkum, sum eru virkin á brekøkinum, at standa saman. Tann megin og styrkin, sum MEGD vísir á og týdningurin, sum liggur í sjálvum viðarbulinum, sum skal leggja lunnar undir, at greinar og bløð fáa møguleika at vaksa, mugu vit ongantíð gloyma, at hetta skapa vit í felag.

Hóast MEGD er bulurin, so er einki lív uttan tykkum í limafeløgunum. Og tá ið vit siga *saman ið MEGD megna vit*, so hugsi eg, at tað er júst saman, at vit taka burtur illgrasið ella deyðar greinar, sum kunnu hava hug at stinga seg upp.

Um vit ikki standa saman, so fer neyvan nakar annar at gera arbeiðið fyri okkum.

Brekrættindasáttmálin vísir veg

Tað var eisini saman við tykkum í fjør, at greidd varð úr hondum frágreiðing, sum seinni varð send brekrættindanevndini hjá Sameindu tjóðum og lagt varð fram í Gevève. Hóast samfelagið seinastu árini er broytt til frama fyri fólk, ið bera brek, so mugu vit viðurkenna, at enn eru grundleggjandi viðurskifti, sum okkum tørvar at gera til veruleika.

Úr rúgvuni kann nevnast at fáa brekrættindaumboðið at virka eins og samskipandi eind, at byggja fleiri og ymiskar bústaðir, eftir persónligum tørvi at tryggja rættindatrygd fyri einstaklingin, at skipa langtíðarætlanir yvir um geirar, land og kommunur og aldur, har vunnin rættindi síggjast aftur í lóg, kunngerðum, hugburði og í øllum, sum verður sett í verk.

Enn hugsar politiski myndugleikin og stovnar landsins ov ofta *um okkum uttan okkum*. Hetta eiga vit áhaldandi og saman at gera vart við, so *einki er um okkum uttan okkum*.

Nýggjar tíðir í MEGD

Í dag endar mítt skeið sum forkvinna í MEGD. Saman við tykkum hevur tíðin verið góð, mennandi, spennandi og ótrúliga lærurík. Eg eri vorðin góð við MEGD, og arbeiðið er vorðið eitt slag av samleika. Eg byrjaði saman við Ásu Olsen, og fór víðari saman við Jónvør Christiansen. Síðani hevur tú, Bárður Atlason Ísheim, røkt uppgávuna sum aðalskrivari við eldhugi. Tað hevur ikki verið keðiligt. Hvør á sín hátt hava tit lagt, og leggur tú, Bárður, orku í at gera Føroyar til eitt betri land fyri øll.

Á skrivstovuni hevur verið gott fólk, og í dag avgreiðir Steindóra á Stongunum til lítar tað, sum kemur inn á skrivstovuna. Og so sjálvandi nýggjastu greinina á bulinum, sum er Dánjal Højgaard, sum tók við sum løgfrøðiligur ráðgevi í september 2023. Hetta hevur verið serstakliga spennandi at fylgt við í.

Og ikki at gloyma! Góðu tit í limafeløgunum og øll tit, sum hava sitið í starvsnevndunum! Gott, opið og erligt samstarv við tykkum hevur alstóran týdning. Um vit eru samd ella ósamd, so mugu vit ongantíð missa sjálvt málið úr eygsjón. Um vit ikki saman gera brekøkið sterkari, verða Føroyar vissuliga fátækar. Vit skulu liva saman og virka saman.

Takk fyri tað, tit hava lagt og enn leggja fyri dagin.

Megi og styrki í felagsskapinum

Nú nýtt forfólk verður valt í dag, havi eg millum ymisk ynski, at tit fara væl við nýggja forfólkinum, geva tíðina, sum skal til, at seta seg inn í uppgávuna, og at tit standa saman við MEGD um týdningarmiklu uppgávuna sum meginfelagið saman við tykkum limafeløgum hava í samfelagnum øllum.

MEGD – megi og styrki. Tað síggi eg í tykkum. Tó gevur positiva merkingin í megi og styrki og møguleikarnir hjá einstaklinginum eins og feløgunum – við avlagan av forðingum í eitt nú kørmum og umstøðum í samfelagnum – bert afurljóð gjøgnum gott samstarv.

Framhaldandi fara fleiri at merkja, at lívið ikki er beint fram. Vit møta avbjóðingum í lívinum, sum gera, at vit noyðast umvegir, niður á næstu reglu – tað ger onki – viðhvørt høvdu vit jú ikki vilja verið tað fyri uttan. Soleiðis er lívið.

Tað er í hesum rúminum, sum vit eru í dag, at viðarbulurin kann gerast meginlutur, har tit limafeløg finna lív í at vaksa, mennast og nørast. Har tit vónandi finna ró, nøring, vøkstur, orku og tryggleika.

Ja, alt er, eins og skapið á viðarbulinum, ófullkomið, men tá ið tit fara at undrast á, hví skapið er ella umstøðurnar eru so, spyrjið, forvitnist og fáa samtalu í lag. Tí rundi viðarbulurin eigur at skapa vernd og felagsskap.

Takk fyri!